# D Í
# OMMUNU




**12 HÚS**

*Undir Gøtueiði eru 12 sethús, men í tí eina húsinum búgva tvær familjur. Regin Joensen býr í svørtu húsunum við hvítari grund og við sprossavindeygum, sum síggjast fremst á myndini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Upprunaliga vendu húsini oman og niðan, men abbi mín bygdi uppí tey suðureftir og vendi teimum soleiðis suður og norður. Hetta var fyrst í 1900-talinum.

Regin heldur, at orsøkin til, at húsini vendu oman og niðan er, at hetta kravdi minni útgrevstur, samstundis sum kjallari fekst til kúnna.

– Tey seinnu árini búði ein gamal drongur í hesum húsum. Hann búði mest hjá beiggja sínum, og tá beiggi hansara doyði, flutti hann inn har.

Hann veit eisini at siga, at hin fyrsti, sum fyri meiri enn 150 árum síðan búði í hesum húsum, kom úr Syðrugøtu, hin næsti kom av Skála – og hin triði úr Kunoy.

– Teir giftust inn her, leggur hann aftrat.

## Áttu borgarstjóra

Vit spurdu eisini Regin Joensen, hvussu tað er at vera ein so lítil partur av eini miðalstórari kommunu, sum gamla Gøtu kommuna var – og nú eini lutfalsliga stórari kommunu, sum Eysturkommuna er.

> **... upprunaliga vendu húsini oman og niðan, men abbi mín bygdi upp í tey suðureftir og vendi teimum soleiðis suður og norður...**
>
> REGIN JOENSEN

– Eg haldi ikki, at hetta hevur riggað so galið. Tað er nú ikki bara Gøtueiði, sum er ein so lítil partur av kommununi. Gøtugjógv er eisini ein lítil partur, og síðan er hin minsti parturin ella býlingurin av Eysturkommunu Effo-støðin í Skálafirði og eini sethús, sum liggja beint sunnanfyri støðina. Tað er hesi húsini, sum bilasølumaðurin, Jóhannes Berg, eigur. Tað var Júst í Túni, sáli, sum bygdi hesi húsini, meðan hann fekst við aling í Skálafirði.

Hann heldur, at bygdin Undir Gøtueiði hevur verið rímiliga væl fyri í kommununi, og hetta kemst kanska ikki minst av, at bygdin hevur átt borgarstjórar og bygdaráðslimir í fleiri ár.

– Vit hava eisini havt umboð í kommununi, síðan samanleggingina í Eysturkommu, men í setuni, vit nú eru í, hava vit einki umboð, sigur Regin Joensen.

*vilmund@sosialurin.fo*

# 666 Gøtueiði

**TRIVNAÐUR** Postnummarið Undir Gøtueiði er hitt marghháttliga talið 666. Men hetta ger ikki, at fólk ikki trívast í bygdini

Vilmund Jacobsen

Millum tey, sum seinast eru flutt til bygdina Undir Gøtueiði at búgva, eru Anna Elisa og Hjalmar Jacobsen. Tey eru bæði komin í pensjónsaldur.

Røturnar eru ávikavist í Leirvík og á Skipanesi.

Anna Elisa og Hjalmar búgva ovast í Eiðisbrekku, beint norðan fyri, har Oscar og Maud Poulsen búgva. Adressan hjá teimum er Eiðisbrekka 5 – og postnummarið er einki minni enn 666 Gøtueiði!

Tey búgva í húsum, tey keyptu fyri nøkrum árum síðan og trívast væl í vøkrum umhvørvi og góðum grannalagi.

Eiðisbrekka er brøtt og ikki altíð so tespilig í kava og hálku. Vanliga verður brekkan ikki grivin fyri kava, hvørki av Eysturkommunu, ei heldur av Landsverki.

Mangan vetrardagin tekur Hjalmar Jacobsen spakan í egnar hendur og fer at grava, og síðan heldur hann vegin opnan við regluligum grevstri og salti, sum Eysturkommuna koyrir honum til dyrnar.

Anna Elisa og Hjalmar Jacobsen hava rættiliga funnið seg til sættis Undir Gøtueiði, tó at kavi og hálka um veturin kunnu kennast eitt sindur strævin.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Anna Elisa og Hjalmar Jacobsen er millum tey seinastu, sum hava búsett seg Undir Gøtueiði. Hendan dagin, vit hugdu fram við, høvdu tey fingið grind úr Sandoynni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Hugsar ikki um ferðslu

Vilmund Jacobsen

Rættiliga nógv bilaferðsla gongur eftir vegnum niðanfyri bygdina á Skipanesi og bygdina Undir Gøtueiði, men Regin Joensen, sum er uppvaksin Undir Gøtueiði, og nú er komin til pensjónsaldur, sigur, at hann hugsar ikki so nógv um ferðsluna.

– Her hevur altíð verið nógv bilaferðsla, men eg hugsi ikki um hetta til dagligt. Soleiðis hevur tað altíð verið her, síðan bilarnir fóru at koyra, men við Norðoyartunlinum er ferðslan økt.

Regin heldur annars, at ferðslan í økinum sum heild hevur gingið væl, og hann sigur seg ikki minnast, at nakrir serligir trupulleikar hava verið á hesum vegastrekki.

Hann leggur aftrat, at útsýnið eftir vegnum er hampiliga gott, eins og løgreglan ikki so sjáldan ger ferðmátingar.

## Nýggj niðankoyring

Tá Eiðisbrekka, sum gongur niðan til tey ovastu húsini í bygdini, varð gjørd fyri kanska 20 árum síðan, vórðu eini sethús, sum stóðu fyri vegagerðini, tikin niður.

– Eg haldi, at hesi húsini vórðu bygd undir seinna kríggi ella har um leið. Tá tey, sum áttu húsini, ikki kundu fáa byggiloyvi Undir Gøtueiði, bygdu tey sær í staðin hús úti á Skipanesi.

Regin Joensen sigur, at nú er nýggj niðankoyring gjørd til húsini við Eiðisbrekku, soleiðis at bilarnir tryggari sleppa oman á høvuðsvegin – og nýggja niðankoyringin byrjar nú í økinum hjá Runavíkar kommunu.

– So, her er rættiliga tætt millum húsini Undir Gøtueiði, sum hoyra til Eysturkommunu og tey, sum hoyra til Runavíkar kommunu, sigur hann.

Nýggja niðankoyringin til Eiðisbrekku ger tað eisini tryggari og betri hjá teimum, sum búgva í brekkuni, at sleppa oman og niðan aftur í hálku.

*vilmund@sosialurin.fo*